# Disneykonsert í Skipasmiðjuni



*Laila og Jóannes syngja*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Leygardagin skipaði GHM fyri eini familjukonsert í Skipasmiðjuni. Hetta er helst fyrstu ferð at ein konsert varð hildin har, men tað verður neyvan seinastu ferð. Laila Carlsen Hansen var ein av sangaranum á konsertini, og hon var sum heild sera væl nøgd við tiltakið**

FAMILJUKONSERT
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Fyri einum mánað síðan byrjaðu Laila Carlsen Hansen og Jóannes Lamhauge at venja saman við GHM. Og leygarkvøldið varð úrslitið lagt fram fyri almenninginum. Børn sum vaksin vóru sera væl nøgd við eina hugnaliga løtu í Skipasmiðjuni í Havn.

### Plásstrot í Skipasmiðjuni

Tað er ikki oftari enn so at vit upplivað familjukonsertir her á landi. Men hetta vildu tey í GHM gera nakað við. Tey valdu at skipað fyri eini konsert, og tey spældu Disney sangir burturav. Disney verður sum oftast sett í samband við teknifilmar, og leygardagin var onki undantak. GHM, Laila Carlsen Hansen og Jóannes Lamhauge framførdu 4 sirpur (medley) av kendum Disneyløgum. Hesar sirpur vóru frá 4 ymiskum teknifilmum: "Klokkarin frá Notre Dame", "Junglubókin", "Aladdin" og "Lion King".

Av tí at hetta var fyrstu ferð at ein slík konsert varð hildin í Skipasmiðjuni, vistu tey í GHM ikki hvørja undirtøku tey kundu vænta, men tá ið konsertin fór av bakkastokki mundu eini 300-400 fólk verða til staðar. Laila greiður frá, at tey gjørdust ikki sørt kløkk tá ið tey sóu tí stóru mannfjøldina, og hetta gjørdi bara tiltakið enn stuttligari.

"Í veruleikanum høvdu vit plásstrot. Av tí at Skipasmiðjan er eitt arbeiðspláss, er rættiliga skitið á gólvinum. Men vit rullaðu pappír á gólvi, og so bóðu vit børnini um at koma at seta seg á pappíri framman fyri pallin. Hetta riggaði ordiliga væl, og gjørdi tiltakið enn hugnaligari", sigur Laila Carlsen.

Annars metir Laila, at hølini riggaðu rættiliga væl til tiltakið. "Hóast hølini ikki eru optimal, so letur tað seg væl gera at fáa tað at ljóða gott har inni. Vit hongdu teppir upp á veggirnar, fyri at hetta skuldi doyva ljóðið, og hetta riggaði væl".

### Sera dugnaligur framsøgumaður

Laila sigur við Sosialin, at konsertin gekk sera væl. "Tað var ikki bara tað tónleikaliga sum gekk væl, men sanniliga skal framsøgumaðurin nevnast. Tað var Kári Bæk sum var settur at røkja hesa uppgávu. Hann megnaði at leiða børnini og foreldrini ígjøgnum allar søgurnar, og børnini livdu seg veruliga inn í sangirnar", greiður Laila frá.

"Tað sum var serliga stuttligt var, at hetta var fyri børnini. Tey hugnaðu sær óført, og tað ger tað eisini sera stuttligt hjá okkum sum spæla og syngja. Tá ið frásøgumaðurin greiddi frá søgunum svaraðu børnini aftur, so hetta gjørdist ein hugnalig luttakandi konsert".

### Laila og Jóannes

"Tað riggaði sera væl at syngja saman við Jóannes. Hann er ein fínur sangari og entertainari", greiður Laila frá. Av tí at flestu søgurnar í hesum Disneysangum hava ein mannligan høvuðsleiklut, sang Jóannes eitt sindur meiri enn Laila. "Eg havi fingið onkrar viðmerkingar um, at eg kanska átti at sungið eitt sindur meir, men eg haldi at eg og Jóannes býttu tað væl ímillum okkum", sigur Laila.

Fyri Lailu var øll konsertin eitt langt hæddarpunkt. Men um hon skal draga eitt persónligt hæddarpunkt fram, so skal tað verða tá ið hon sang lagið "God Help The Outcasts" úr "Klokkarin frá Notre Dame". "Hesin sangurin snýr um at vera eitt útskot, og eg haldi at flest øll hava vit onkuntíð merkt hesa kenslu á okkara egna kroppi. Eg haldi eisini at hetta var ein rørandi løta hjá mær og áskoðarunum", sigur Laila Carlsen Hansen at enda.

# Rútmiska Kórið í Hoydølum luttekur á Asfalt

Fyriskipararnir lovaðu at Asfalt skuldi verða eitt fjølbroytt tiltak. Og tað má man siga at tað verður. Í dag var "Rútmiska Kórið í Hoydølum" kunngjørt.

Rútmiska Kórið í Hoydølum er sera týdningarmikið – ikki bara sum eitt gott og frískt kór, men eisini sum ein mentunarlig institutión. Kórið hevur fostrað eina ørgrynnu av tónleikarum og sangarum, og hevur seinastu nógvu árið framført serliga spennandi og nýskapandi konsertir og sangleikir. Fleiri av okkara kendastu tónleikarum hava slitið tónlistarligu barnaskógvarnar í Rútmiska Kórinum í Hoydølum.

Rútmiska Kórið í Hoydølum hevur luttikið í stórum verkætlanum sum Skeyk, Hair, GodSpell og ikki minst Jósef og tað ótrúliga litfagra dreymakotið. Í løtuni venur kórið til eina stóra uppseting av tí stóra sangleikinum "Fame".

Kórið er altíð í eini støðugari menning, og tann javna útskiftingin av fólkið ger, at kórið altíð hevur ein frískan dám yvir sær. Tað er Zakaris Sørensen sum stjórnar kórinum. Júst hvat ið kórið fer at framføra á Asfalt, veit undirritaði ikki, men eitt er vist. Hetta kórið er væl øðrvísi enn hini kórini í landinum, og tað er altíð eitt stuttligt og spennandi upplivilsi at hoyra hesar ungu sangarar.

## Petur Háberg á Asfalt

Í singer/songwriter kappingini í fjør vetur trein eitt nýtt talent á føroyska tónleikapallin. Petur Háberg vísti síni kynstur sum lagsmiður og sangari, tá ið hann vann seg í finaluna í kappingini. Tað sum eyðkennir tónleikin hjá Petur Háberg er, at tað er gospeltónleikur í einum nútímans hami. Hóast Petur er ein sokallaður singer/songwriter, so eru løgini hjá Petur rættiliga rokk/poppkend.

Tá ið Petur luttók í kappingini í fjør vann hann sær nógv hjørtu. Í finaluni var hann ein sannur puplikumsfavorittur, so tað er onki løgi at fyrireikarirnir á Asfalt hava biðið Petur um at luttaka, tí at hann er sera undirhaldandi at hyggja og lurta eftir.

Hann er ein fínur gittarleikari, men hansara veruliga styrki er røddin. Hann syngur nokkso frekt og arbeiðir nógv við tí trýsti, ið hann leggur á røddina. Hetta gevur tónleikinum eina eyka dimensión.

Petur er ikki bangin fyri at greiða frá hvat ið løgini snúgva seg um, og hann smæðist ikki fyri at siga eina stuttliga søgu.

## Creme de la creme á Asfalt

Ert tú til jazz??? Gleð teg!!!

Um føroyingar eiga nakrar veruligar jazzrottur, so er ongin ivi um at limirnir í "Jazztrio" eru nakrar teirra. Um ein nevnir Arnold Ludvig, Rógva á Rógvu og Leiv Thomssen, so renna tankarnir beinanvegin mótvegis jazztónleikinum. Teir eru kanska best kendir úr superbólkinum "Plúmm", men sanniliga eisini er vert at nevna, at teir vóru ein týðandi partur av "Terji og Føstufressar" bólkinum. Felags fyri hesar tríggjar er, at teir uttan iva eru millum teir allarbestu føroyingar á sínum ljóðføri. Tá ið teir finna saman, plagar tónleikurin at gerast eitt bland av jazzi og funkið.

Arnold og Rógvi vístu veruligar dygdir við at kappast móti sær sjálvum á stóru AME-finaluni í apríl 2005 – teir spældu seg í finaluna við ikki færri enn tveimum bólkum. Og teir gjørdu heldur ikki minnið enn at vinna finaluna við "Go Go Blues".

Arnold (bass) hevur í nógv ár verið virkin á Kanadiska tónleikapallinum, Rógvi (trummur) var virkin í Íslendska tónleikapallinum og Leivur hevur í leingi verið virkin á danska tónleikapallinum. Nú eru teir aftur samlaðir í heimlandinum, og hetta sleppa vit at merkja á Asfalt.